## Næstan samdir

Russar og amerikanarar eru eru næstan samdir um, hvussu londini skulu skerja sínar kjarnorkuvápnagoymslur. Tað segði russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, við russiskar fjølmiðlar í gjár. Hann segði, at samráðingarnar hava gingið væl, og at londini eru samd um 95 prosent av innihaldinum í einum komandi sáttmála. Partarnir samráddust í Moskva í síðstu viku, og teir hittast aftur í næsta mánaði. Teir báðir forsetarnir, Dmitrij Medvedev og Barack Obama, hava sett sær sum mál at skerja kjarnorku vápnagoymslurnar, so tey bæði londini skulu skerja talið á kjarnorkuløðingum munandi.



## Noreg kanska semingsland

Íslendska sjónvarpið Støð 2 visti í gjár at siga, at íslendska stjórnin hevur havt samband við fleiri lond fyri at vita, um nakað land er sinnað at royna seg sum semingsland í Icesave-trætuni millum Íslendingar øðrumegin og bretar og niðurlendingar hinumegin. Sambært sjónvarpsstøðini er tað rættiliga sannlíkt, at ein norskur politikari verður semingsmaður. Norska Dagbladet endurgav í gjárkvøldið talsmannin hjá forsætismálaráðnum í Reykjavík fyri at siga, at stjórnin umhugsar at velja Týskland, Frakland ella Noreg sum semingsland. Norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, sigst vera ein møguleiki.

# Leiga flogfar til skíðferiu

**Føroyski áhugin fyri skíðferiu er vaksandi. Í kanning, sum kram.fo gjørdi í farnu viku svaraðu 10% av knappliga 450 spurdum, at tey ætla sær á skíðferiu í ár. Tveir havnarmenn hava leigað flogfar til Akureyri á skíðferð**

SKÍÐFERIA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hóast áhugin fyri skíðferiu er vaksandi í Føroyum, so eru tølini munandi lægri enn í grannalondunum. Í Danmark ætla umleið triði hvør at fara á skíðferiu, sambært rejseliv.dk.

Tað er heldur ikki vanligt í Føroyhum at hava frí og ferðast uttanlands vetrarhálvuna. Skúlarnir hava onga vetrarferiu so sum í Danmark, og tí er heldur ikki eins lætt hjá familjum við børnum at fara av landinum.

Hartil er rættiliga dýrt at ferðast úr Føroyum, og ferðin til Danmarkar er tískil dýrasti parturin av einari skíðferiu til dømis til Alpurnar ella Noreg.

### Skíðferð til Íslands

Tað er sum nevnt fyrst og fremst Alpurnar, Noreg ella Svøríki, sum lokka føroyingar við kava, men ein annar møguleiki er eisini grannarnir fyri norðan.

Í Íslandi er møguligt at standa á skíð stóran part av árinum. Umstøðurnar eru góðar, serliga á Akureyri. Umframt tað, er íslendska krónan sera lág í løtuni, og tað merkir, at landið er lutfalsliga bíligt at ferðast í.

Eitt annað á plussíðuni er, at túrurin ikki er so langur.

Og nú verður so møguligt hjá føroyingum at sleppa beinleiðis til Akureyri at standa á skíð. Tveir havnarmenn hava tikið stig til at leiga ein flúgvara beinleiðis til Akureyri í mars.

- Eg havi sjálvur staðið á skíð á Akureyri, og tað kann eg viðmæla øllum, sigur Rúni Højgaard, ið er annar av stigtakarunum.

Sjálvur starvast hann dagliga sum flogskipari hjá Altantsflog, men í mars situr hann millum ferðafólkini, tá farið verður til Akureyrar.

### Fýra dagar

Tað, sum heldur føroyingum aftur at fara á skíðferð – burtursæð frá, at nógv ikki duga at standa á skíð – er, at prísurin er ov høgur, og tað tekur ov langa tíð, um ein flýgur til Danmarkar og síðani koyrur við bili víðari til eitt nú Eysturríki. Tá fer ein heilur dagur við koyring hvønn vegin.

Tað tekur bert góðan tíma at flúgva til Akureyri, og tí verður farið avstað hósmorgun og komið heim aftur sunnukvøld. Hetta merkir, at fólk missa bert tveir arbeiðsdagar, men fáa fýra dagar á skíð.

- Vit hava skipað fyri uppihaldi í Íslandi, bussambandi til hotel og skíðstað, leigu av skíðum og lyftukort, so tað er einki hjá luttakarunum at hugsa um, annað enn at melda seg til, sigur Rúni Højgaard.

Hann sigur, at tankin um at skipa fyri einnum slíkum túri kom, tá hann var ein skíðtúr í Eysturríki fyri tveimum árum síðani.

- Jákup Bech Jensen var eisini við á hesum túrinum, og vit tosaðu longu tá um, at vit áttu at fáa ein slíkan túr í lag aftur, sigur Rúni Højgaard.

### Ísland besta boðið

- Síðani tá hava vit hugt at fleiri møguleikum, millum annað í Svøríki, har eg havi gott samband, sigur Jákup Bech Jensen.

- Tá ið Rúni nevndi møguleikan at leiga ein flúgvara og flúgva beinleiðis til Akureyri, helt eg hetta verða funnin fressur. Eg havi sjálvur fleiri ferðir staðið á skíð í Bláfjøll, sum liggur beint uttan fyri Reykjavík, men umstøðurnar á Akureyri eru nógv betri, sigur Jákup Jensen.

Stutti teinurin til Akureyri og lága íslendska krónan ger, at túrurin kann gerast bíliga.

Fyrireikararnir siga, at tað er heldur eingin trupulleiki hjá fólki, sum ikki hava staðið á skíð áður, tí skipað verður fyri undirvísing.

Tað eru longu fleiri, sum hava meldað seg til, men pláss eru framvegis eftir. Fyrireikararnir leggja dent á, at túruin ikki er fyriskipaður við vinningi fyri eygað.








## P/F Fiskaaling søkir laborant

Søkt verður eftir laboranti til Fiskaaling at arbeiða í ymiskum verkætlanum innan aling. Granskingarvirksemi á Fiskaaling er í støðugari menning, og vit hava tørv á einum kønum laboranti til núverandi og komandi verkætlanir. Av tí at Fiskaaling ger gransking og menning innan nógv ymisk øki, krevur laborantstarvið at tú ert fleksibul og áhugað/ur í at arbeiða við ymiskum slag av laborant arbeiði.

**Førleikar**
- Útbúgvin laborantur
- Góð samstarvsevni
- Fleksibul
- Gott yvirblik
- Jaliga innstillað/ur at læra

Fiskaaling manglar í løtuni laborant til verkætlanir innan góðsku á alifiski, resistenskanning av laksalús og ílegugransking. Tað er ein fyrimunur um tú hevur kunnleika til eitt ella fleiri av hesum økjum og/ella aðrar viðkomandi starvsroyndir.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ásu Jacobsen á tlf. 214748 ella Ingolf Joensen á tlf. 214747.

Umsókn við avritum og møguligum ummælum, skal sendast til:

**P/F Fiskaaling**
Við Áir
FO-430 Hvalvík

ella

fiskaaling@fiskaaling.fo

Umsóknin skal vera komin fram í seinasta lagi 10. februar 2010. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Fiskaaling hevur virksemi við Áir, í Nesvík og í Skopun. Samlaða starvsfólkatalið er umleið 20, herav fleiri granskarar. Virksemi fevnir um at granska, menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, herundir verkætlanir innan matvørugóðsku, aliumhvørvi, fóður, vatn, framleiðsluhættir, nýggj aliøkir, aling á harðbalnum økjum v.m. Meiri fæst at vita á www.fiskaaling.fo

P/F Fiskaaling | Við Áir | www.fiskaaling.fo